





## Føroyskar Søgur:

# 6.000 DVD-fløgur seldar og nýggj útgáva á veg

**Føroyingar taka so mikið væl undir við filmsverkætlanini Føroyskar Søgur, at grundarlag er fyri at geva út eina nýggja fløgu við søguligum filmsbrotum, ið vísa gerandisdagin í Føroyum gjøgnum 100 ár**

Føroyskar søgur

**Jan Müller**
jan@sosialurin.fo

– Hetta má sigast at vera ein success.

Soleiðis sigur samskiftisráðgevin Per Højgaard, sum vegna Eik Banka og Eik Grunnin hevur samskipað filmsverkætlanina Føroyskar Søgur, ið flestu føroyingar munnu kenna.

### 6.000 DVD-fløgur seldar

– Neyvan nøkur bók í Føroyum seinasta árið man hava selt so væl, sum Føroyskar Søgur. Seinasta hálva árið eru seldar umleið 6.000 DVD-fløgur við føroyskum filmsperlum. Tað gevur grundarlag fyri enn einari útgávu. Framleiðslan er longu byrjað, og málið er, at Føroyskar Søgur 2 eru til keyps longu fyri summarfrítíðina, sigur Per Højgaard.

Í stuttum kann sigast, at Føroyskar Søgur er ein filmsverkætlan, ið hevur til endamáls at lýsa ymisk tíðarskeið og smáar og stórar tilburðir seinastu 100 árini á filmi, so sum føroyingar sjálvir hava upplivað hesi.
Tað eru føroyingar sjálvir, sum saman við útlendingum hava gjørt filmsupptøkurnar, ið eru grundarlagið undir verkætlanini.

### Mentanararvur talgildast

Meira enn 500 rullur av filmi